# Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

**Spyrjari:** Bjørt Samuelsen, løgtingsmaður

**Svarari:** Uni Rasmussen, landsstýrismaður í fíggjarmálum

**Evni:** Øktar inntøkur hjá landsskassanum og hjálp til familjur í fíggjarligari neyð

**Spurningar:**

1. Hvussu nógv meira av mvg er komið í landskassan í ár vegna øktu prísirnar á olju og bensini?
2. Hvussu nógv meira av mvg er komið í landskassan í ár vegna øktu prísirnar á mat- og drykkivørum?
3. Hvussu nógv er inntøka landskassans vaksin av øktum prísum á gerandis-/neyðsynjarvørum sum heild?
4. Arbeiðir landsstýrið við nøkrum ætlanum um at lata hesar øktu inntøkur útaftur til familjur, sum ikki fáa endarnar at røkka saman, tí livikostnaðurin er so nógv øktur?

**Viðmerkingar:**
Nógvar familjur og stakir persónar fáa ikki endarnar at røkka saman í løtuni, tí livikostnaðurin er so nógv øktur. Barnarfamiljur, ung, pensjónistar og fólk við skerdum førleikum teljast millum teirra, sum eru í vanda fyri at enda í fíggjarligari neyðstøðu og tí mugu leita sær hjálp.

Sambært svari frá landsstýrismanninum í almannamálum til fyrispurning frá undirritaðu í summar (52-199/2021) vóru í 2019 gott 1000 børn í fátækraváða í Føroyum. Prísurin á olju, bensini, mati, ja allarflestu gerandisvørum er nógv øktur, samstundis, sum tað er sera dýrt at leiga ella keypa sær tak yvir høvdið. Tí er stórur vandi fyri, at fólk, sum livdu í fátækraváða, nú enda í fátækt. Fleiri hjálparfelagsskapir boða nú frá, at eyðsýnt nógv fleiri venda sær til teirra at biðja um hjálp og stuðul at fáa endarnar at røkka saman.

Tá prísstøðið hækkar, vaksa inntøkur landskassan eisini, tí mvg av dýrari vørum gevur meira mvg í kassan.

Spurningarnir verða settir fyri at fáa fram í hvønn mun, landsstýrið umhugsar at lata øktu inntøkurnar útaftur til teir borgarar og familjur, sum eru illa sperd av høga livikostnaðinum, og nú ikki fáa endarnar at røkka saman uttan hjálp.

**Á Løgtingi, 23. september 2022**

Bjørt Samuelsen